# Kunnger› um broyting í kunnger› um útgjald v.m. av arbei›sloysisstu›li

**§ 1.** Í kunnger› um útgjald v.m. av arbei›sloysisstu›li, dagfest 26. november 1999, ver›ur henda broyting gjørd í § 7:

*Frítí›arløn - skerjing og endurrindan*

Arbei›sloysisstu›ulin ver›ur skerdur vi› frítí›arløn, sum tann arbei›sleysi fær útgoldna í útgjaldsskei›um.

*Stk. 2.* Arbei›sloysisstu›ulin ver›ur skerdur vi› frítí›arløn sambært stk.1 eftir somu reglum, sum arbei›sloysisstu›ulin ver›ur sker›ur vi› A-inntøkum sambært § 6.

*Stk. 3.* Tann, i› ikki longur er arbei›sleysur, kann fáa endurrinda›an arbei›sloysisstu›ul, i› er skerdur eftir stk. 1 og 2, sambært hesum treytum:

1. Vi›komandi skal sambært løgtingslóg um frítí› vi› løn hava rætt til frítí› í sama frítí›arári, sum skerjingin er framd fyri. Hildin frítí› sambært § 14, stk. 2 í løgtingslóg um arbei›sloysistrygging og arbei›sávísing, ver›ur mett sum n‡tt frítí›,
2. vi›komandi skal í sama frítí›arári halda frí frá arbei›i sínum og skjalprógva vi› váttan frá arbei›sgevara, at so er, umframt hvussu long frítí›in er, og
3. vi›komandi fær í mesta lagi endurrinda› ta› tímatal, sum arbei›sloysisstu›ul ikki er goldin fyri, vi› stø›i í sama útrokningargrundarlagi, sum n‡tt er í sambandi vi› skerjingina.

**§ 2.** Henda kunnger› fær gildi frá 1. mai 2000.

St‡ri› fyri Arbei›sloysisskipanina, 23. mars 2000

Karin Kjølbro (sign.)
forma›ur

/ Elisabeth O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stu›ul til arbei›sleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbei›sleysum at fáa arbei›i og at umsita arbei›sávísing fyri føroyska arbei›smarkna›in. Á ALS starvast í løtuni 23 fólk. Virksemi› hjá ALS er í høvu›sheitum lógarásett. Ovastu lei›sluna hevur st‡ri› fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbei›sgevara- og løntakarafeløgunum á arbei›smarkna›inum - ver›ur valt av Føroya Landsst‡ri.*

ALS

Arbei›sloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 319550 • Fax 310263
teldupostur: als@als.fo

# NLP Skeið
## og fyrilestur

**Tíðslinjuskeið:** ***"Skapa tað lív tú ynskir"***

Skeiðið snýr seg um tína framtíð, og hvussu tú nært tey mál, tú setur tær.
Á skeiðnum verður m.a. arbeitt við:

- *Hvussu tú fært eina betri fatan av tær sjálvum, og hvat er rætt fyri teg.*
- *Hvussu tú upploysir negativar kenslur*
- *Hvussu tú broytir forðingar til møguleikar*
- *Hvussu tú finnur tað, ið veruliga hevur týdning fyri teg, og hvussu tú nýtir hetta til at seta tær mál í framtíðini.*

***Tíð:*** 28.-30. apríl 2000. Frí. kl. 15-20, leyg. kl. 10-18 og sun. kl. 10-17
***Stað:*** Føroya Arbeiðarafelag, Tjarnardeild 5, Tórshavn
***Kostnaður:*** kr. 1700,- íroknað mat. *Hevur tú verið á tíðlinjuskeiðnum áður, fært tú kr. 500 í avsláttri.*

**Einasamrøður:** Jack Makani fer at hava einasamrøður, tilmelding neyðug.

**Fyrilestur:** *(ókeypis atgongd, tilmelding ikki neyðug)*

**Introduktión til "Accelereret Pratitioner útbúgvingina"**
Jack Makani greiðir frá um "Accelereret Practitioner útbúgving" sum verður í Føroyum sept. 2000.
***Tíð:*** 27/4 kl.19.00
***Stað:*** Verkstaðið Vón, Hóvabrekka 1, Argir

***Skeiðleiðari og fyrilestrahaldari:*** Jack Makani (dani), NLP venjari
***Tilmelding til skeiðið og upplýsingar:*** Hjá Dianu Borgnýardóttir, tel 441100 ella 281044.
Teldupost dkonsult@post.olivant.fo Sí annars heimasíðu: www:nlp-huset.dk

Almanna- og Heilsumálastýrið

# Projektsamskipari
## til stuðulsfólkaøkið

Almanna- og heilsumálastýrið søkir eftir projektsamskipara í tíðaravmarkað starv, hvørs uppgáva verður at lýsa og gera uppskot til, hvussu stuðulsfólkaøkið skal skipast framyvir. Starvið er tíðaravmarkað í 1 ár.

Stuðulsfólkaøkið umfatar uml. 128 stuðlar, sum veita stuðul til umleið sama tal av brúkarum um alt landið.

Stuðulin verður veittur eftir barnaforsorgarlógini, forsorgarlógini og løgtingslóg um almannapensiónir. Tey seinastu árini er stuðulsfólkaøkið vaksið munandi og stórur tørvur er á samskipan.

Arbeiðssetningurin verður at lýsa og gera uppskot um skipan av økinum:

- fakliga
- fyrisitingarliga
- fíggjarliga

Harumframt hevur tað alstóran týdning, at hædd verður tikin fyri teimum serligu føroysku viðurskiftunum, fyri at tryggja eina góða tænastu um alt landið.

Vit kundu hugsað okkum ein persón sum:

- dugir at arbeiða sjálvstøðugt,
- er skapandi og framtakshugaður,
- hevur góð evni at orða seg í skrift og talu,
- dugir at hugsa í heildum tá loysnir skulu finnast.

Rætti umsøkjarin hevur viðkomandi fakliga útbúgving. Innlit í stuðulsfólkaøkið og royndir í projektssamskipan er ein fyrimunur.

Samskiparin arbeiðir undir Stýrisbólkinum fyri Stuðulsfólkaøkið, sum er settur av Almanna- og heilsumálastýrinum, og fær møguleika at nýta starvsfólkaorku í stýrinum og stovnum undir tí.

Starvið verður sett sambært sáttmála/avtalu millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, stjóra í Heimarøktini & Serforsorgini tlf. 317240 ella fartelefon 281643.

Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:
**Almanna-og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er sett til týsdagin 2. mai 2000 kl. 14.00.

*Halt* **sosialin**



# Deildarlei›ari til ALS

Starvi› sum deildarlei›ari á
Fíggjar- & fyrisitingardeildini er leyst at søkja

Høvu›suppgávan hjá deildarlei›aranum er, í gó›um samskifti vi› starvsfólki›, at lei›a og skipa dagliga arbei›i› á deildini.

Fíggjar- & fyrisitingardeildin, sum í løtuni hevur 8 starvsfólk, umsitur:

- dagliga roknskaparførslu og ger› av deildarroknskapum
- ger› av leypandi roknskapum og ársroknskapi
- ger› av rakstrar- og gjaldførisætlanum
- fíggjarligu ognirnar hjá ALS
- skrivarauppgávuna hjá lei›sluni
- ger› av kunningartilfari
- móttøkuna
- edv-kervi› á stovninum
- elektroniskt skjalasavn

Starvi› er sera fjølbroytt og avbjó›andi. Deildarlei›arin skal tí hava hóskandi útbúgving og gó›ar starvsroyndir.

Vi›komandi skal vera førur fyri og hava hug til, vi› samstarvi og virkisf‡sni, framhaldandi at menna øll øki, i› deildin umsitur.

ALS stendur stø›ugt fyri broyttum arbei›sfortreytum, og skal deildarlei›arin hava evni at tillaga seg broytingum í arbei›sumstø›unum.

Deildarlei›arin myndar, saman vi› deildarlei›aranum fyri Tryggingar- & ávísingardeildina og stjóranum, dagligu lei›sluna á ALS.

Løn sambært avtalu.

Starvi› ver›ur at seta sum skjótast. Skrivlig umsókn vi› avriti av prógvum og møguligum vi›mælum skal ver›a Arbei›sloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 8. mai 2000.

Umsóknir skulu stílast til Elisabeth O. Gaardbo, stjóra á ALS, sum kann geva nærri frágrei›ing um starvi› á telefon 215535.

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stu›ul til arbei›sleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbei›sleysum at fáa arbei›i og at umsita arbei›sávísing fyri føroyska arbei›smarkna›in. Á ALS starvast í løtuni 23 fólk. Virksemi› hjá ALS er í høvu›sheitum lógarásett. Ovastu lei›sluna hevur st‡ri› fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbei›sgevara- og løntakarafeløgunum á arbei›smarkna›inum - ver›ur valt av Føroya Landsst‡ri.*

ALS

Arbei›sloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 319550 • Fax 310263
teldupostur: als@als.fo

# Til sølu

Um hóskandi boð fæst, er ognin á matr. nr. 774 í Niels Finsensgøtu 40 í Tórshavn til sølu. Grundøkið er 260 fermetrar. Húsini eru í trimum hæddum við tilbygningi, ið er væl hóskandi til goymslu ella annað. Samlaða gólvvíddin er 224 fermetrar.

Húsini kunnu síggjast við at ringja til fartelefon 217510 ella til telefon 311590 eftir kl. 18.

# Føroya Sjúkrahjálparafelag

hevur havt aðalfund 14/4. Nevndin varð afturvald. Í nevndini eru: Fríðbjørg Jacobsen, formaður, Karla Haraldsen, næstformaður, Sigrun Høgnesen, Sólrun Lamhauge og Marita Sivertsen. Tiltakslimir eru Conny Joensen og Anna-Britt Eyð.

**Føroya Sjúkrahjálparafelag**

**Lesið sosialin**

# Frítíðaravloysarar til

Postverk Føroya

Postverk Føroya søkir eftir summarfrítíðaravloysarum til postarbeiði/kassaavgreiðslu á hesum støðum:

Tórshavn
Kvívík/Leynum
Vestmanna
Fuglafirði
Gøtu
Leirvík



Umsøkjarar skulu hava útbúgving/royndir innan skrivstovuarbeiði.

Í summar verður eisini søkt eftir fólki til postútberingá hesum støðum:

Tórshavn
Argjum

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Umsóknir við viðmælum/prógvum verða at senda til:

Postverk Føroya
Postboks 3009
110 Tórshavn

í seinasta lagi tann 2 mai 2000

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

Annu Katrinu Olsen
Tlf. 31 55 62 lok 144
anna.katrina.olsen@postverk.fo

# PÁSKA CAVERY

**Etið so nógv tit orka**
**Bert kr. 98,-**

**VELJI ÍMILLUM:**

**Heilstoktan oksaháryggg**
**Fylt lambatjógv**
**Marineraða kalkunbringu**
**Svínakamb stoktan sum vilt**



**Bernaise sós, piparsós, soðsós og soppasós**
**Rómabakaði eplir, hvít eplir og chips**
**Stórt salat- og pastaborð 15,-**

*Børn undir 10 ár ókeypis, saman við vaksnum.*

*Tilboðið er galdandi 20/4-24/4.*

Opið er: 12.00-15.00 og 18.00-22.00

**HOTEL TÓRSHAVNAR SJÓMANSHEIM**
Gallan á 1. hædd
Tel. 350000

Sosialurin - 311820

# HÚS, ÍBÚÐ ELLA KAMAR

*Fyri 3 av starvsfólkum okkara verður søkt eftir húsum, íbúð ella kømurum við atgongd til køk og bað.*

Hotel Føroyar
Tlf. 317500
Hotellið við útsýninum

Sosialurin - 311820

# Føroya Fimleikasamband

hevur aðalfund í ÍSF-húsinum leygardagin 13. mai kl. 15. Uppskot til nýggjar nevndarlimir skulu vera inni 1 viku áðrenn.

**Nevndin**

# Alt arbeiði innan rørsmíð verður gjørt
# T - Rør
**Tel. 221 241 & 319 782**